Starvslýsing



IKON // TEL 320 870

# Starvsfólk til bókhaldið

**Søkt verður eftir starvsfólki til bókhaldið at byrja skjótast tilber. Starvið er fjølbroytt, mennandi og fevnir um øll økir innan bókhald.**

Talan er um eitt starv, har tú fært høvið at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, sum er í støðugari menning, saman við dugnaligum og góðum starvsfeløgum.

**Førleiki**

Avgerandi er, at tú hevur áhuga í fyrisitingarligum viðurskiftum og royndir innan bókhald. Tað er umráðandi, at tú er fyrikomandi og hevur hegni og hug at hjálpa til, har tað er neyðugt og tá á stendur.
Vit vænta at tú hevur lokið handilsskúlaprógv ella hevur royndir, ið eru samsvarandi við hesa útbúgving.

**Starvstreytir**

Løn, arbeiðstíð og onnur starvsviðurskifti eru eftir nærri avtalu.

**Umsókn**

Vilt tú vita meir um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Esmar Olsen, fíggjarleiðara á telefon 344012. Umsókn við CV, prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til eo@formula.fo ella við brævi til

**Formula.fo**
**Att. Esmar Olsen**
**Stiðjagøta 5**
**Postrúm 1078**
**FO-110 Tórshavn**

Vit vóna, at rætti umsøkjarin kann byrja uml. 1. desember 2008.
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 7. november 2008.

---

Formula.fo er ein KT fyritøka við 70 fólkum í starvi. Vit útvega vørur og tænastur í Føroyum og uttanlands. Í fyrisitingini á Formula.fo arbeiða í dag 5 fólk.

**formula.fo**

Stiðjagøta 5-11 · Tórshavn
Tel 344000 · www.formula.fo




# Tú kanst gera mun

## Set ein hálvan dag av til at hjálpa Javna

Frá leygardegnum 8. november til leygardagin 15. november ætla vit okkum í flestøll hús í landinum at selja Javna-álmanakkan. Tí heita vit á teg um at tekna teg sum seljara.

Vit ætla at gera hetta til ein hugnaligan og stuttligan dag í felagsskapi.

Hevur tú hug at gera mun? Ring tlf. 31 48 27 ella send eitt teldubræv áðrenn 31. oktober til javni@javni.fo. Minst til at upplýsa navn, bústað og (far)tlf.nr.

SENDISTOVAN

javni
– Virkin og virðismikil

Hoydalsvegur 40 · Postsmoga 1133 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 48 27 · www.javni.fo · javni@javni.fo